## DAGSINS MEINING

# Prutlar undir lokinum…..

Enn er lítið og einki komið fram um uppskotið til komandi fíggjarlóg. Tað tykist vera sera torført at fáa nakað at vita úr Tinganesi, men tað skilst, at her prutlar álvarsliga undir lokinum. Eftir øllum at døma eru føgru orðini hjá fíggjarmálaráðharranum um, hvussu væl stendur til hjá landskassanum, ikki heilt í tráð við veruleikan, í hvussu er ikki tann veruleika, at tørvur er á at hækka kontoirnar til nógvar av landsins týðandi stovnum. Sum skilst er status quo tvs. útreiðslur og inntøkur sampakka, tá ajourføringar eru gjørdar og lønarvøksturin er lagdur omaná. Men ikki eitt oyra er til nýggjar ella hækkandi útreiðslupostar hjá teim ymsu landsstýrisráðunum.

Tað er ein sannroynd, at tíðir skifta og broytast, og tí sjálvandi slepst ikki undan at hækka upphæddirnar á fíggjarlógini til fleiri av ymsum økjunum. Um landsstýrið heldur, at hetta bara kann gerast við at lækka aðrar útreiðslupostar, so tekur tað so dyggiliga feil.

Eingin ivi er um, at vit komandi dagarnar, tá lokið verður tikið av fíggjarlógarpottinum ella tað fer av av egnari megi, fara at uppliva eitt eljustríð, klandur og rok í samgonguni. Vit hava heldur ikki gloymt, hvat formaðurin í Fíggjarnevndini segði herfyri. Hann gjørdi púra greitt, at hann fór ikki at góðtaka, at landsstýrið kom við eini eykajáttanarlóg fyri og aðrari eftir. Tvs. at fer landsstýrið nú at seta propp í og harvið forða fyri, at tey ymsu økini í samfelagnum fáa størri upphæddir til rakstur av einum og øðrum slag, og fíggjarnevndarformaðurin heldur fast um avgerðina ikki at loyva fleiri eykajáttanum út yvir árið, so merkir tað í veruleikanum, kaos og kríggj í allari skipanini. Og tað verða mongu niðurpíndu økinini frá kreppuárunum, sum helst koma at merkja hetta meinast.

Andstøðan hevur eina stóra ábyrgd her at tryggja sær, at ikki mong týðandi samfelagshjól rusta ella stegða upp. Hækkandi játtanir eru í veruleikanum í mongum førum tað sama sum at smyrja samfelagshjólini, sum tá kunnu halda fram at koyra við somu ferð. Eitt annað mál er so íløgurnar, sum krevjast sohvørt samfelagshjólini eldast og treingjast til umvælingar ella til at skiftast út. Andstøðan má taka umrøddu ávaringar í størsta álvara.

Og tað er eisini rætt yvirfyri veljarunum aftur og aftur at minna á, at landsstýrisflokkarnir sjálvir eru atvoldin til, at vit koma í eina ringa og ómøguliga støðu. Teir kutaðu 360 mill. kr. av blokkinum í nærum ovfarakæti. Rætt er at minka blokkin og gera okkum minni bundnar av fremmandum pengum, men hetta átti at verið gjørdi í fleiri stigum. Nú vil so tíðin vísa, um blokkkutanin ikki er rís til egna r…… hjá samgonguni. Men í síðsta enda ein vanlukka fyri alt samfelagið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til »hálvárroknskapin« 2002

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*



**Niðurstøða:**
Tá fíggjarlógin fyri 2002 bleiv samtykt av løgtinginum á heysti 2001, vísti fíggjarlógin eitt avlop uppá 371 mió. kr. Við seinni eykajáttanum og hækkaðum inntøkum er avlopið á fíggjarlógini í august 2002 komið niður á umleið 100 mió. kr. Til samanberingar kann nevnast, at 100 mió. kr. er ikki nokk til at gjalda avdráttirnar av láninum í Tjóðarbankanum.

Avlopið á fíggjarlógini er minkað við meiri enn 270 mió. kr. í leypið av einans 8 mánaðum. Nú er avlopið komið niður á 100 mió. kr. og væl er hugsandi, at avlopið verður enn minni tá avtorðnar, tí fleiri eykajáttarnir eru væntandi í oktober.

**Neyvar inntøkumetingar**
Við í metingini av einum avlopi á 100 mió. kr. eru neyvar og væl undirbygdar metingar av inntøkusíðuni. Sostatt kann roknast við, at inntøkusíðan ikki fer at broytast munandi, men fer at hava tær upphæddirnar, sum nú eru mettar.

M.a. er vissa fyri, at blokkstuðulin er 629 mió. kr., og inntøkurnar frá flestu partafelagsskattum eru kendar, tí roknskapirnir eru almannagjørdir nú. Eisini eru metingarnar av inntøkuskattunum og MVG-inntøkunum sera neyvar, tí so mikið av árinum er runnið.

Í hesum sambandi kann ein undrast yvir, at fullveldissamgongan ikki megnar at hava eitt hóskandi avlop á fíggjarlógini tá blokkstuðulin enn er omanfyri 600 mió. kr. og bæði fólkakirkja,løgregla, dómsvald, sjóverja, flogvøllur o.a. enn ikki er yvirtikið. **Hvussu ætla teir at fíggja framhaldandi niðurskurð í Ríkisveitingini?**

**Eykajáttarnir**
Harafturímóti má roknast við, at fleiri eykajáttarnir fara at koma í oktober, har triðja og seinasta umfar av eykajáttanum skal fyri tingið. Serliga kann vísast á tørvi fyri eykajáttanum innan heilsuverkið, har Landssjúkrahúsið og “serviðgerð uttanlands” hava størri útreiðslur enn áður mett.

Annars vísir útreiðslugongdin á stórt sæð øllum økjum, at nógv størri partur av játtanini er nýttur í fyrra hálvári 2002 í mun til fyrra hálvár 2001. Sostatt má roknast við, at antin skulu fleiri eykajáttarnir til, fyri at stovnarnir skulu kunnu røkja sínar skyldur, ella skulu stovnarnir spara munandi í seinna hálvári. Óansæð hvussu trupuleikin verður loystur, vil landskassin merkja tað, antin sum størri útreiðsla av eykajáttanunum, ella sum minkandi skatta- og avgjaldsinntøka orsakað av sparingunum.

Niðurstøðan má tískil vera, at grundarlagið av metingini av einum avlopi á 100 mió. kr. er sera ivasom, og ein meiri varislig meting vildi nokk verið eitt runt 0 á botnlinjuni á landskassaroknskapinum ár 2002.

**Góð ráð ...**
Man kann einans verða samdur í fíggjarmálaráðnum, tá ráðið skrivar:

“Inntøkur landskassans verða lutfalsliga størri, tá ið stórur vøkstur er í búskapinum. Hetta kemst av, at automatiskir konjunkturregulerandi stabilisatorar eru bygdir inn í skatta-, inntøku- og veitingarskipanir landsins. Tá ið búskaparvøksturin er stórur, verður tí av sær sjálvum tikið meira inn í skatti og avgjøldum, samstundis sum útgjaldingarnar til arbeiðsloysi og tílíkt minka, og øvugt í minni góðum tíðum. Tað er tí týdningarmikið, at útreiðslugrundarlag landskassans verður ikki lagt eftir høgu inntøkum landskassans, nú ið hákonjunkturur er í landinum.”

**... sum teir ikki fylgja sjálvir**
Spurningurin er, um landsstýrið ikki júst hevur lagt útreiðslugrundarlag landskassans eftir høgu inntøkunum, sum hava verið seinastu árini. Sum nú er, er jú ikki ráð til at gjalda avdráttir av láninum í tjóðbankanum, og enn minni at leggja til síðis. Hetta hóast at talan er um bestu búskaparligar tíðir Føroyar nakrantíð hevur upplivað.

# Hvør skal gjalda fyri fólkakirkjuna

**Felagið fyri Kirkjuráðslimir**
*Edvin Joensen form.*



Tað undraði meg ikki sørt at lesa grein í blaðnum 4. september, har fýra samgongutingmenn úttala seg um fíggingina av fólkakirkjuni framyvir. Hesir tingmenn fáa tað at ljóða, sum um kirkjan og kirkjufólkið vilja hava fríkirkjufólk at gjalda fyri raksturin av fólkakirkjuni. Tá ein so spyr seg sjálvan, hvaðani teir hava hesa løgnu hugsan, jú, so hava teir tað úr teirra egna samgonguskjali.

Eg skal tí greiða frá, hóast tað skuldi verið óneyðugt, hvat umboð fyri kirkjufólkið hava skrivað til Mentamálastýrið um hetta mál.

Í nevndaráliti um lóg um yvirtøku av fólkakirkjuni, sum varð lagt fram seinasta heyst, og sum m.a. varð viðgjørt av Felagnum fyri Kirkjuráðslimir, varð lagt upp til at øll fólkakirkjan skuldi fíggjast yvir kirkjuskattin. Hetta vildi merkt, at kirkjuskatturin skuldi hækkast við umleið 14 mil kr. Felagið helt, at landskassin átti at rinda nakað fyri tær samfelagstænastur, ið prestar gera, og metti hetta til umleið 40% av teimum 14 mil kr.

Hetta vildi merkt, at allir landsins skattaborgarar skuldu rindað umleið 5.6 mil kr og fríkirkjufólk í Føroyum umleið 840 000 kr av hesum yvir skattin fyri hesar tænastur.

Hetta var sjálvandi bert ein meting, og halda fríkirkjufólk, at hetta er ov mikið, kunnu vit altíð tosa um tað, tí fólkakirkjan ynskir ikki olmussu frá nøkrum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ikki mugu tey gloymast

**Niels J. Erlingsson**
*Akureyri*

Nú í nøkur ár hevur verið sokallaðir „franskir“ dagar á Fáskruðsfirði á eysturlandinum, har minst er tíðin, ið franskmenn fiskaðu við Ísland, sum man hava verið eini 300 ár. Nú er eisini farið at minnast veru teirra á vestfjørðum, tí har vóru eisini franskir sjómenn. Franska tjóðin tekur ikki, at tað er rætt at gloyma hetta fólk sum stríddist við fiskiskap langt norðuri í norðuratlantshavi.

Hví eg seti hetta fram, er at føroyingar áttu her við Ísland – bæði konur og menn, sum ár eftir ár, ið oftani út av lagi ringar umstøður, frá vári til út á hesyt fiskaðu frá lítlum bátum og virkaðu fiskin í salt. Talið er at árið 1870-71 havi verið fyrst verið roynt við bátum frá skipi liggjandi inni á firði, bundið við land. Seyðisfjørðurin var fyrsta plássið, har roynt var við hesum veiðihátti, men sum tíðin leið sóu menn, at ov langt var tað stundum at rógva út har fiskurin helt seg, so farið var so smátt at førka seg uttar í firðina, við skipunum, og væl lá fyri hjá føroyingum at fiska.

Árið 1995 kom út bók eftir Vilhjálm Hjálmarsson f.v. tingmann og ráðharra ættaður frá Mjáafirði, har kemur ymiskt fram sum gaman er at lesa um, samskifti føroyinga og íslendinga fyrstu árini, men sum árini gingu og fólk fór at venjast hvørt við annað var hetta sum ein tjóð. Seinni kom tað at føroyingar fingu pláss á ymsum støðum, fram við landinum, á eysturlandinum, líka frá Langanesi og suður eftir eysturlandinum. Menn bygdu sær skúrar til at halda til í, har bæði var húsast og fiskurin virkaður, atløgupláss vóru næstan ikki til á hesum støðum og knossast var við veiðuna upp frá fjøruni. Ikki veit eg um nakrastaðir eru heimildir til um hvussi nógvir føroyingar vóru í Íslandi við henda veiðuhátt, men sagt er, at á Vopnafirði skuldu eitt summarið hava verið 250 føroyingar – konur og menn. Seinni vóru føroyingar við útróður frá landi – bæði á vestfjørðinum og norðurlandi.

Hví seti eg hetta niður á blað er, nú eg síggi, at franskmenn eru farnir at minnast fólk sítt sum lá við Ísland og stríddist, ikki bara fyri seg og síni, tí alt arbeiðsstríð bæði á sjógvi og landi tænar eisini tjóvini fyri bestu.

Hevði nú ikki verið lag, at føroyska tjóðin á onkran hátt við minnisvarða ella á annan hátt vildi vísa hesum stóra hóði sum mong ár eftir ár fóru yvir at rógva út – sagt er at onkur fór til Íslands at rógva áut yvir 30 ár.

# Eitt orð er eitt orð ein maður ein maður

**Eivin H. Jacobsen**



Í farnu viku var ein samrøða í degi og viku við Tingmennirnar í Vágum um kostnaðin av at nýta tunnilin undir Vestmannasundi, nú hann stendur liðugur um slakar 3 mánaðar, ordini hjá Marius Dam høvdu fingið ilt í fleiri tingmenn, og var málburður sum órealistiskur, óseriøsur varpaður inn í sjónvarpsstovuna hjá fólki.

Mikudagin 10.07.02 vóru umboð fyri kommunurnar, saman við fjølmiðlunum boðnar á tiðindafund hjá P/F Vágatunnilinum á ellisheiminum í Miðvági, rúmi var karmur um eina framsýning sum kallaðis samferðsla til Vágarnar, ein sera áhugaverd framsýning nú Vestanstevnan stundaði til, tey flestu sum mótt vóru til fundin høvdu gjørt sær sínar tankar hvat fór at verða almannakungjørt.

Nevndarformaðurin í P/F Vágatunnilinum greiddi frá arbeiðsgongduni, og kundi upplýsa at tunnulin lat upp 26.11.02 kl.11.00. 6-7 mánaðar áðrenn tíðuna. Síðan fingu tíðindafólkini møguleika til at seta spurningar, og var tað týðuligt at prísspurningurin var tað sum hevði tann størsta áhugan, men hvussu tú bendi og snaraði spurningunum so fekst einki at vita.

Sjálvandi eru øll fegin um at arbeiði hevur gingið val, og at tunnulin kann takast í brúk 7 mánaðar áðrenn tíðina, men spurningurin um hvat gjaldi verður stendur enn ósvaraður, og er hettar ein týdningarmiklari og meira avgerandi spurningur en dagurin hann skal takast í nýtslu, hesin spurningur ørkymlar fólk nú leysasøgurnar byrja at ganga um høgar prísir, hettar kunnu vit bert takka nevnduni fyri Vágatunnilinum fyri, tá tað 10.07.02 kundi almannakunngerast hvussu arbeiði hevði gingist og at tunnulin lat upp november einar 7 mánaðar áðrenn tíðina so visti man eisini ein vegleiðandi nýtsluprís

Tá Landstýrismaðurin í samferðslumálum sigur at polittikararnir eiga at halda seg burtur, tí talan er um ein nevnd sum hevur fingið eina bundna uppggávu, so er tað ikki minni ørkymlandi, tá hugsa verður um samferðslu kring oyggjarnar í dag, samferðsla hevur altíð havt ein tídðandi leiklut í tíð politiska orðaskiftinum her kunnu politikkarar til ein og hvørja tíð koma vid uppskoti um hækkan ella lækkan av tænastustøgið. Fyri Vágatunnulin er tað ein nevnd sum hevur eina bundna uppgávu á handilsligum grundarlagið, men sum kanska ikki í nóg stóran mun tekur hædd fyri teimum samfelagsligu viðurskiftinum, men meira fyri teimun fýggjarligu, og fyri at gerða tingini eitt sindur meira fløkt, so er tað eingin sjálvfylgja at nevndin í Vágatunnulinum er tann sama sum í Norðoyatunnilinum, og um so var, at talan var um hvør sína nevnd, kundi afturgjaldstíðin og nýtsluprísir havt ymiskar uppfatanir.

Út frá nøkrum sum her er nevnt, er spurningurin um politiska ábyrgdin við hesum nýggju modellum verður flutt, og um tíðin ikki er komin aftur til tíð fyrrverðandi samferðslunevndina, serliga tá hugsa verður um at á yvurtøkulistin hjá Landstýrinum stendur alt innan flúgving.

Ein afturvendandi spurningur av fjølmiðlunum, hvussu kemur tunnulin at ávirka Vágarnar, hesin spurningur er torførur at svara uppá so leingi í nevndin fyri Vágatunnulin hevur kortini tætt inn at sær, hvussu verða prísirnir fyri vinnulívið, verður hettar kappingaravlagandi, hvat verður prísurin fyri tey sum skulu til ella av oydni til arbeiðis, ella okkara ungdómur sum allur má av oydni til víðari skúlagongd, men sum nú kundi hugsa sær at búð heima.

Undirritaði er ein av teimum nógvu Vágafólkunum, sum haldi fast vid nýtslugjald, eitt ord er eitt ord ein maður ein maður soleiðis plagar at verða tikið til. Hettar var einasti møguleiki fyri føstum sambandi um Vestmannasund sum fyrstu ferð bleiv lagt framm á tingið fyri 24 áðrum síðan av Wilhelm Nielsen og Haldor Hansen Sála, men at Vágafólk hava sagt at tey skulu gjalda rækstur av tunnlinum ljós, ventilatión,pumpur ella kavarudding av vegastrekkinum, ella tað sum verri er mvg oman á nýtslugjaldi, tað er ókent.

Vit eiga ikki at gloyma tann góða stuðul ið viðgerðin av undirsjóvartunnilinum um Vestmannasund fekk frá Nordoyatingmonnum, skal undirsjóvartunnulin til Norðoyggjar blíva verðuleikið, og ikki fáa somu lagnu sum tunnulin um Vestmannasund fekk í sínari tíð, má talan verða um nýtslugjald, og skal útjagarin ikki stuðla hvørjum øðrum, ja hvar skal hann so koma frá, men skuldi Norðoyartunnulin fingið trupulleikar, sum eg ikki vóni, so liggur svarið í einari bólgnaðari fíggjarætlan saman við einum í so nógv skerdum blokki, tað uppskotið eigur so ikki Marius Dam. Og um mann heldur at nýtslugjaldið bert verður í afturgjaldstíðuni, fer mann skeivur, men hesin spurningur má standa til tað tíð hvør í so tá livir.

Lat ikki hesa stórhending sum byggitekniskt er ein sukse nú hon stendur liðug, blíva til eina fiasko nú hon skal takast í brúk.

# Heilafelagið: Fundur um ókeypis viðgerð av apopleksiraktum fólki

TÍÐINDASKRIV
*Heilafelagið*

Fundur verður um **"ókeypis viðgerð av apopleksiraktum"** og øðrum, ið eru rakt av kroniskum sjúkum.

Fundurin verður á Gjáargarði við Gjógv, leygardagin hin 7. september kl. 10.00.

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum luttekur á fundinum. Ætlandi fáa fundarluttaka-rarnir høvi at seta landsstýrismanninum nærri spurningar um evni.

**Viðmerking:** í Føroyum er viðgerð á sjúkrahúsi ókeypis fyri fólk, ið verða innløgd á sjúkrahús. Ókeypis sjúkrahúsviðgerð er sera góð skipan, ið øll eisini vit í Heilafelagnum eru sera glað fyri. Heilafelagið vónar tó, at allir sjúklingar, ið verða raktir av akuttari apopleksi í framtíðini verða lagdir inn á apopleksi-serdeild (líkn. E3 á Landssjúkrahúsinum) og ikki á "vanliga" medisinska deild.

Viðgerð eftir innleggjan á sjúkrahúsi og viðgerð á klinikk uttanfyri sjúkrahús er harafturímóti aloftast ikki ókeypis fyri sjúklingar her á landi og er hetta sera óheppið - serstakliga fyri tey, ið verða rakt av kroniskari sjúku. Fólk, ið fáa blóðtøpp í heilan ella fáa heilabløðing, hava aloftast brúk fyri lívslangari venjing at betra og viðlíkahalda kropsligan førleika, tosiførleika og kognitivar førleikar.

Í londum vit vanliga samanlíkna okkum við sum t.d. Danmørk er viðgerð/uppvenjing av sjúkling-um, ið hava kroniskar sjúkur, ókeypis fyri sjúklingin. Víst kann verða á, at skipan um "vederlagsfri" fysioterapi varð sett í gildi í Danmørk í 1989, og merkir hetta, at danir, ið hava ávísar kroniskar sjúkur, hava havt rætt til varandi og framhaldandi ókeypis uppvenjing/viðlíkahaldsvenjing, seinastu mongu árini.

Umframt "vederlagsfri" fysioterapi hava danir hin 1. apríl 2001 sett í gildi kommunala lóg um "Genoptræning af ikke sygehusindlagte borgere" og hava hin 1. juli 2001 sett í gildi amtskom-munala lóg um "Genoptrænings-planer til alle patienter".

\- - -

Vit í Heilafelagnum halda at stórur tørvur er á ókeypis viðgerð/uppvenjing av fólki, ið verða rakt av apopleksi og øðrum kroniskum sjúkum. Viðmerkjast kann, at als ikki er møguleiki fyri ergoterapeutiskari venjing og lítil møguleiki er at fáa taluviðgerð eftir innleggjan á sjúkrahúsi. Gjørt verður vart við, at longri varandi uppvenjing t.d. á fysioterapiklinikk er sera kostnaðarmikil fyri sjúklingin (10 viðgerðir x 1 tíma kosta sjúklinginum 1260 kr.). Havt eigur at vera í huga, at fólk, ið hava kroniskar sjúkur hava ofta onki arbeiði og mugu tískil liva av lágari avlamispensión, ið er nógv lægri enn t.d. danska avlamispensiónin. Fólk, ið t.d. fáa meðal avlamispensión fáa 6683 kr. um mánaðin áðrenn skatt at liva fyri. Avlamispensiónistar og onnur, ið hava lága inntøku, megna ikki sjálvi at gjalda kostnaðarmikla viðgerð/uppvenjing.

Vónandi fáa vit ein góðan fund um evnið soleiðis, at "hol" verður sett á at loysa trupulleikan, sigur nevndin í Heilafelagnum í tíðindaskrivi.